# MANNING



Hervið verður søkt eftir manning til

**M/F NORRÖNU,**

til summarsiglingina 2000, sum byrjar 13. mai.

Størvini, ið sett verða, umfata allar deildir innan catering, so sum:

* Pursarar, kokkar, bakarar, sleiparar, barrfólk, cafeteriafólk, tænarar, kioskgentur, koytugentur og informatiónsgentur.
* **Góðkent heilsuprógv fyri sjófólk krevst.**
* Tað er ein fyrimunur fyri at verða settur í starv, at viðkomandi hevur **trygdarskeið,** og hevur lokið **brandskeið,** sum er undir 5 ára gamalt.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**P/F SMYRIL LINE**
**Postboks 370**
**FO-110 Tórshavn**

## Pedagogur søkist

Vit søkja eftir einum pedagogi til eina stovu við 16 børnum í aldrinum 3-7 ár at byrja 1. apríl 2000 ella seinni.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.

Skrivlig umsókn við viðmælum prógvum verða at senda í seinasta lagi 20. mars.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til barnagarðin tlf. 312854.

**Sankta Josefs Barnagarður**
Varðagøta 12 • 100 Tórshavn

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Ford Fiesta 1.3, 5 hurðar

**Árg.:** 1999

**KM:** 7.951

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast hjá P/f Wenzel, Marknagilsvegur, 100 Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Beinleiðis tlf. 345727 • Fartelefon 283892
Fróði Müller
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 08-12

## Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Starvsløn til listafólk

Á fíggjarløgtingslógini 2000 eru kr. 100.000 játtaðar til starvsløn í 6 mánaðir. Starvslønin verður latin listafólki, sum virkar innan skaldskap, myndlist, leiklist, tónlist ella aðra list.

Nevnd, sett av landsstýrismanninum í mentamálum, ger tilmæli til landsstýrismannin um, hvør eigur at fáa starvslønina. Til tess at fáa starvsløn, má umsøkjarin kunna vísa til verk á høgum listaligum støði.

Umsøkjarar fáa oyðublað sendandi við at venda sær til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Postrúm 3279 • 110 Tórshavn
Telefon 355050 • Telefax 355055
e-postur: umms@umms.fo

Gjørt verður vart við, at oyðublaðið eisini er at finna á internetinum á www.umms.fo . Umsóknir verða at senda Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, og er umsóknarfreistin **mánadagin 3. apríl 2000**. Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið á telefon 355050.

GRINDAMANNAFELAGIÐ
1993 1584

## Aðalfundur

Aðalfundurin verður í Norðurlandahúsinum leygardagin tann 8. apríl 2000 klokkan 14.00 við hesi skrá:

1. Frágreiðing frá virki felagsins í farna ári
2. Grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram
3. Val av einum nevndarlimi
4. Val av grannskoðara
5. Ásetan av limagjaldi
6. Innkomin mál
7. Ymiskt

Gjørt verður vart við, at mál, sum ynskjast viðgjørd sambært pkt. 6, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 7 dagar fyri aðalfundin.

Aðalfundurin er almennur.

Høvi er altíð hjá áhugaðum at gerast limir.

**Nevndin fyri »Grindamannafelagið«**
Fútalág 40 • 100 Tórshavn

## Frá Tvøroyra Sosialdemokratiska felag

Lýsti aðalfundurin 13. mars er fyribils útsettur.

**Nevndin**

Føroya Postfelag

## Farloyvisstarv

**Søkt verður eftir skrivara í hálvtíðarstarv í tíðarskeiðnum 15. apríl 2000 - 15. apr. 2001, tá skrivari felagsins fer í farloyvi.**

**Skrivarin skal taka sær av allari fyrisitingini hjá felagnum**

* vera skrivari á fundum, undir samráðingum o.ø.
* hava alla umsitingina av felagnum og húsum felagsins
* alt brævaskifti felagsins
* roknskap felagsins

**Krøv til umsøkjara**

* góðan føroyskan málkunnleika
* góðan teldukunnleika
* roknskaparkøn/ur – helst hava kunnleika til concorde roknskaparskipanina
* seta seg inn í sáttmálaviðurskifti o.a.
* neyðugt er at kunna arbeiða sjálvstøðugt
* vera røkin
* at hava yvirlit yvir alt virksemi felagsins

Neyðugt er, at viðkomandi er skrivari á kvøldfundum, samráðingarfundum o.ø. fundum.

Starvið verður lønt sambært avtalu.

Meira fæst at vita um felagið á heimasíðu okkara: www.postfelag.fo

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til felagið millum kl. 9.00-12.00.

Umsóknin skal vera felagnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 24. mars og sendast til:

**Føroya Postfelag**
Tinghúsvegur 15
Tórshavn
tlf. 317231

teldupostur: postfelag@postfelag.fo

## Marknaðardagur

Marknaðardagur fyri alla familjuna verður í Læraraskúlanum/Venjingarskúlanum á Frælsinum í dag.

Á skránni eru spøl, andlitsmáling og hárflætting, klatriveggur, ymiskt undirhald, matsøla, loppumarknaður og tombola. Tiltakið verður frá kl. 10 til 18.

**Skótalið Sigmunds Brestissonar**

## Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 04.-05. apríl 2000 og á **Landssjúkrahúsinum** 06. apríl 2000.

Tíð fæst við at ringja á **tlf. 45 54 63**, týsdag og hósdag kl. 10-12, í seinasta lagi 28. mars 2000.



## Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Lærugreinaráðgevar

**Starvið**
Í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum/Landsmiðstøðini fyri Undirvísingaramboð eru nakrir tímar sum ráðgevar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2000.

Ráðgevingin fatar um øll lærugreinaøkini í fólkaskúlanum, skúlabókasavnið og KT-økið. Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvørgreinaligum høpi, og møguleiki er at søkja eina ella fleiri lærugreinir – eisini tvørtur um lærugreinaøkini.

Samanlagt eru 81 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1 fyrisitingartíma). Vanliga verður ráðgevi settur við 8 til 12 lønartímum um vikuna.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein/-um og starvsøkjum, starvið fevnir um. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava hollan førleika á KT-økinum, og væntað verður, at teir eru hugaðir at nýta KT í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevin verður sett/settur eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Tann, ið sett/settur verður, skal undirvísa frestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skal verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 5. apríl 2000.

Gjøllari upplýsingar fáast frá leiðaranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Landsmiðstøðin fyri Undirvísingaramboð**

***Undirvísingar- og mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.* ***Landsmiðstøðin*** *er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingaramboð, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við UMMS eina lærugreinráðgevaskipan og skipar fyri fak- og inspiratiónsskeiðum fyri lærarum*

## Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Skrivari til verkætlanarbólk

**Starvið**
Í sambandi við setan av nevnd til at taka sær av økismenning á størru plássunum kring landið, er eitt áhugavert og fjølbroytt tíðaravmarkað starv sum skrivari í nevndini leyst at søkja.

Høvuðsuppgávurnar hjá nevndini eru m.a. at útvega yvirlit yvir sannlíku vinnuføru støðu føroyinga í útjaðaranum hvørji fimm ár fram í tíðina saman við eini lýsing av aldursbýti og til- og afturgongd á skúla-, mentanar- og heilsuøkinum og fylgjunar av hesum, bygt á støðugu broytingarnar í fólkatalinum nakað aftur í tíðina.
Verkætlanin skal taka støði í eini røð av ábótum á størri økini kring landið við atliti m.a. til trygg viðurskifti, samferðslukervi, aldursbýti og íbúgvarsamanseting, almenn/privat arbeiðspláss, vinnulig kor og nýggjar vinnur.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar hava

* Viðkomandi útbúgving, sum t.d. cand. merc., cand. polit, cand. oecon. ella líknandi
* Góð samstarvsevni og eru fyrikomandi
* Hava royndir úr øðrum starvi og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit bjóða:**

* Eitt starv har tú sjálv/sjálvur kanst vera við til at skapa starvið
* Eitt spennandi starv undir leiðslu av einari 5 manna nevnd
* Arbeiði er á einum høgum fakligum stigi.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. mars 2000, kl. 15.00. Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, á tlf. 35 50 50.

**Undirvísingar- og mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. **Verkætlanin,** ið er tíðaravmarkað, skal verða liðug til 1. august 2000. Ein nevnd við 5 limum verður sett at stjórna arbeiðinum. Nevndin er sett saman av fólki við breiðum førleika á hesum øki. Skrivarin kemur at hava tilvísing til nevndina.

## Suðuroyar Sjúkrahús

Søkt verður eftir sjúkrasystir til frítíðaravloysing á skurðgongini í tíðarskeiðnum frá 1. mai til 31. august 2000.

Umsøkjarin skal hava royndir sum sjúkrasystir á skurðgongd.

Talan er um starv í fullari tíð, við tilkallivaktum frá heimi.

Løn- & setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 371133 lokal 128.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
**Suðuroyar Sjúkrahús**
**Postrúm 51**
**800 Tvøroyri**

Umsóknarfreist: 21. mars 2000.



www.sosialurin.fo

## Suðuroyar Sjúkrahús

Søkt verður eftir sjúkrasystrum til frítíðaravloysing á sjúklingadeildini í tíðarskeiðnum frá 1. mai til 30. september 2000.

Setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 371133 lokal 128.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
**Suðuroyar Sjúkrahús**
**Postrúm 51**
**800 Tvøroyri**

Umsóknarfreist: 21. mars 2000.

## Málaraarbeiði

Biðið verður um tilboð at mála skrivstovuhús ráðsins uttan v.m.

Arbeiðið umfatar:
Skorstein, takskegg, vindskeiðir, klædning, grund, betonggarðar, vindeygu og úthurð (uttan og innan) træ- og jarnrimaverk, portur og flaggstong.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skrivstovuna tlf. 311180.

Tilboð, umfatandi arbeiði og tilfar, skulu latast okkum áðrenn 25. mars 2000.

**FØROYA JARÐARRÁÐ**
Postrúm 50 • R. C. Effersøesgøta 4 • 110 Tórshavn
tlf. 31 11 80 • fax 31 11 85 • teldupostur: fj@fj.fo